# Bronx í J. Broncksgøtu




*Salong Bronx í J. Broncksgøtu 34 læt upp mánadagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

HÁRFRÍÐKAN

*Ingrid Bjarnastein*

Mánadagin læt upp nýggj hárfríðkanarstova í Jónas Broncks Gøtu 34 í Havn.

Salong Bronx er navnið á nýggju hárfríðkanarstovuni, og kann ein siga, at tað hóskar jú væl til, tá salongin jú liggur í Jónas Broncks Gøtu.

Tað er Lizzy Mouritsen, sum hevur opnað nýggju hárfríðkanarstovuna. Lizzy starvaðist áðrenn á Salong Bylgjuni á Argjum.

Hvussu ber tað til, at Lizzy hevur valt at lata upp nýggja hárfríðkanarstovu í Havnini?

– Tað eru nóg mikið av hárfríðkanarstovum í Havn, men hóast alt, so haldi eg, at allar frisørar droyma um at verða sjálvstøðugar, sigur Lizzy Mouritsen.

– Fyribils verði eg einsamøll, men møguliga fái eg onkran afturat mær seinni.

Tríggir stólar eru í salongini, og longu í gjár høvdu fleiri verið og fingið sær nýtt hársnið í nýggju hárfríðkanarstovuni.

Ung millum 11 og 16 ár:

# Skapa sjónleik og tónleik

TÍÐINDASKRIV

Í juli mánaða komandi ár verður læraraskúlin í Havn karmur um mentanarlegu fyri ungar sjónleikarar og tónleikarar.

Norðurlandahúsið stendur fyri verkætlanini, sum skal fylgja eini framleiðsluprosess av dramatiseraðum tjóðarkvæðum og nýskrivaðum tónleiki.

Tey ungu skulu skriva eina arbeiðsdagbók, og aftaná leguna verða tríggjar bøkur settar saman við nótum, handritum, leiðbeiningum og viðmerkingum frá ungdómunum sjálvum, umframt eina ungdómsbók.

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur tikið stig til nakrar stórar verkætlanir, sum millum annað, skulu hava sum mið at menna norðurlendsku listarligu skapanina, og harvið gera hana sjónligari. Mentunarlegan fyri ung er føroyska liðið í hesari heildarætlan.

Fimtan tónleikarar úr Íslandi, Føroyum og Finlandi venja saman til eina konsert við norðurlendskum skúlaorkesturverkum. Í løtuni verður arbeitt uppá at bjóða tónaskøldunum til Føroya at fylgja venjingunum.

Tríggir sjónleikarabólkar fyrireika hetta árið hvør sítt kvæði. Í Føroyum er tað ungdómsbólkurin hjá Havnar Sjónleikarafelag, sum fer at leggja út eina egna dramatisering av Margrethukvæðnum. Á leguni vera hinir bólkarnir settir inn í bólkapallar, soleiðis, at sjónleikararnir – júst sum tónleikararnir – koma at arbeiða saman og gera eina felags framførslu.

Tað serstaka við samansetingini av bólkum er, at finnar, føroyingar og íslendingar, umframt grønlendingar og samar, eru tey, sum altíð skifta mál í norðurlendskum sambandi. Hesuferð er ætlanin at øll skulu sleppa at brúka sítt egna mál – felags málið verður tað listarliga. Í eini tíð har anglo-amerikansk mentan verður bjóðað fram sum dagligur kostur vil verkætlanin undirstrika ta sannførslu, at norðurlendsk ung hava okkurt eins spennandi í síni egnu mentan, og at tey duga at samskifta yvir um mentanarlig og málslig mørk. So leingi sum tey eru tryg í síni egnu mentan, spenna kropsmál, rútma og ljóðspæl eins vítt og orðini. Kanska skilja vit ta finsku mentanina betri, tá ið vit síggja finnar spæla Kalevala á finskum, enn vit høvdu gjørt, varð tað framført í umseting.



*Savnsmynd*

## Skipaeftirlitið fingið nýggjan deildarstjóra

TÍÐINDASKRIV

Fiskimálastýrið kunngerð, at Óli Hans Hammer Olsen, búsitandi í Streymnesi, er settur sum nýggjur deildarstjóri á Skipaeftirlitinum.

Óli Hans Hammer Olsen er 44 ára gamal og útbúgvin skipsførari. Harumframt hevur hann tikið eftirútbúgving sum merkonom og umfatandi skeiðvirksemi innan trygd á sjónum. Óli Hans hevur eisini drúgvar starvsroyndir á sjóvinnuøkinum og royndir innan umsitin.

Í løtuni starvast Óli Hans Hammer Olsen sum undirvísingarleiðari í Mentamálastýrinum, men fer hann at taka við nýggja starvinum skjótast gjørligt.

8 umsóknir vóru til starvið.



# Miðvingar avgjørdu valið

**Til seinasta fólkatingsval varð Miðvágur helst tað valstaðið í kongaríkinum, sum hevði avgerandi ávirkanina á, at Uffe Elleman Jensen ongantíð gjørdist danskur forsætisráðharri. Í dag eru vilstu sambandsatkvøðurnar helst komnar aftur á heimabeitið, halda miðvingar**

VAL

*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Seinast fólkatingsval var, fekk Sjálvstýrisflokkurin 155 atkvøður í Miðvági. Sámal Petur í Grund fekk 151. Tað var mótmæli móti táverandi løgmanni, Edmundi Joensen, sum stutt undan valinum hevði koyrt Sámal Petur úr landsstýrisessinum, tí hesin vildi hava undirsjóvartunnil undir Vestmannasund. Í dag vænta miðvingar, at vilstu sambandsatkvøðurnar frá seinasta fólkatingsvali eru komnar aftur á heimabeitið hjá Sambandinum.

Valúrslitið, seinast fólkatingsval varð hildið, var sera áhugavert í Vágum. Vágafólk vendu Sambandsflokkinum, sum annars er sterkur í oynni, bakið. Eitt beinleiðis mótmælisval aftur fyri ta viðferð, landsstýrismaðurin við samferðslumálum fekk frá løgmanni. Tað kostaði løgmanni fólkatingssessin og danska vinstrahøvdinganum forsætisráðharrasessin.

Vit fara ein tú til Miðvágs at vita, hvussu miðvingar munnu fara at atkvøða í dag. Munnu teir vera vendir aftur til Sambandflokkin, ella er fullveldisrákið, sum nógva staðni er, eisini komið í sambandsoynna Vágar?

Koyri ígjøgnum Sandavág á veg til Miðvágs. Her eru nakrar valplakatir uppi. Leggi merki til, at Tjóðveldis- Fólka- og Javnaðarflokkuirn hava flestar. Kanska hava sambandsmenn ikki verið úti enn við sínum. Og tó. Har liggur okkurt bláligt pappír á vegnum. Og mín sann um tað ikki er sníðið á Marjusi Dam, sum liggur har og hyggur at tí ferðandi.

Ná, teir hava nokk verið úti í nátt, og so eru tær regnaðar niður aftur, tí sum skilst hevur veðrið verið meira at kalla vánaligt í nátt.

Fólkafloksmenninir tykjast eitt sindur seinir í upptrekkinum, tí har ganga tveir og heingja upp, nú ein hálvan tíma áðrenn valhølini lata upp. Men tað er kanska taktikkur. So regna tær heldur ikki burtur, áðrenn fólk kemur á gongd um bygdina.

Løgtingsmaðurin í oynni hevur fingið ein granna við sær, sum stendur so hugagóður og neglir, meðan tingmaðurin prátar við ein veljara, sum kemur framvið. Jú hvør veit, um ikki ein atkvøða er har at heinta?

Haldi leiðina inn til Miðvágs. Onkur hendinga plakat er at síggja gjøgnum bygdina. Mest javnaðarplakatir, leggi eg merki til.

Men komin inn móti skúlanum, har valstaðið er, broytist myndin. Nú eru tær har allar samlar. Allir teir stóru flokkarnir, sum kappast um hesar báðar sessirnar, eru við. Teir báðir smærru tykjast ikki leggja í at brúka pening og orku upp á sovorðið. Heldur ikki Sjálvstýrisflokkurin, sum ikki man vænta tað stóra her vesturi hesaferð.



*Fyrsti veljarin hevur kannað kassan og er í ferð við at koyra atkvøðuseðilin í hann*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tað er friðaligt í skúlanum. Valstýrið er í ferð við at rigga til. Búrini standa klár, og atkvøðukassin stendur víðopin á gólvinum.

Formaðurin greiðir frá, at til valið í dag hava 708 fólk valrætt í Miðvági. Luttøkan plagar at vera umleið tað, nsum meðal er fyri landið,sigur hann.

Tey telja seðlar og leggja í bunti. 20 í hvørt, so lætt er at fylgja við alla tíðina, hvussu nógv fólk hevur verið á vali.

–Kom her, sigur hann og tekur eina gamla bók og vísir mær. Ein gomul valbók, sum skrivað er í fyrstu ferð fyri 85 árum síðan tann 24. november 1916. Og tað er heldur ikki hvør sum helst, sum skrivað hevur. Hondskriftina eigur Mikkjal Dánjalsson á Ryggi, sum var valstýrisformaður, greiðir stýrisformaðurin frá.

Fyrstu ferð, bókin varð brúkt til ein atkvøðugreiðslu, var tann 14. december sama árið, tá atkvøt varð um, hvørt Danmark skuldi lata Vestindisku oyggjarar frá sær. Men valluttøkan í Miðvági var lítil tá. Eini fimm fólk greiddu atkvøðu.

Klokkan slær níggju, og tann fyrsti veljarin er við diskin. Hann fær seðilin og fer in í búrið. Hann er skjótur aftur, og valstýrisformaðurin fer saman við honum at kanna, um tann opni atkvøðukassin er tómur. Jú, tað semjast teir um, og formaðurin steingir, áðrenn fyrsti seðilin verður latin í kassan.

–Eg valdi Sambandið. Lisbeth Petersen, greiðir veljarin frá. Eg kundi sjálvandi valt Marjus Dam, men hann hevur so nógv at gera sum lækni í oynni, at eg helt tað vera best bara at hava hann her og ikki á Fólkatingi.

Jú, líkt er til at sambandsatkvøðurnar fara at koma aftur á heimabeitið í Miðvági hesaferð.

Tað koma fleiri. Eldri fólk, sum hava frí, og saktans er onkur lærari upp í millum eisini, tí skúlin er jú stongdur í dag, og børnini hava fingið frí, nú hann verður nýttur til valstað.

Ikki tann øgiliga trongdin her beinanveg, men nøkur hava kortini verið, tá blaðmaðurin skundar sær út aftur at finna sær eitt stað at skriva stubban, sum sendast skal um Internetið til blaðhúsið á Argjum.

Teir rigga av í Undirhúsinum, sum heldur til í MB húsinum við síðuna av skúlanum. Teir hava havt tann relguliga morgunfundin, og saktans hevur onkur vitað av, at val er í dag. Eg fái eina vinaliga heilsu á veg inn i bilin og verði mintur á, at eg átti at valt Sambandsflokkin, tí tað er tað frægasta, tá saman um kemur.

Jú, tað halda teir helst, verður svarað aftur. Men tað er ov seint nú, tí eg havi longu atkvøtt við brævatkvøðu, so til bar at vera í Miðvági, tá hetta týdningarmikla valstaðið lat upp til fyrsta løgtingsval eftir, at tað hevði avgjørt politisku lagnu Danmarkar í fyra ár.



*Mikkjal Dánjalsson á Ryggi skrivaði tann 24. november 1916 titulblaðið í valbókni í Miðvági*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Fyrstu ferð valbókin varð brúkt, minkaði Danmark*

*Mynd Edvard Joensen*